# Serstaka byggisamtytk nr. 1
## Uppskot til býarskipanarreglur í byggisamtyktini fyri øki 1 í Tórshavnar kommunu

Uppskot til býarskipanarreglur í byggisamtyktini fyri øki 1 í Tórshavnar kommnu.
Sambært løgtingslóg um býarskipanir (lógarkunngerð frá 21. mai 1954) verða settar hesar reglur fyri tað í § 1 nevnda øki 1 í Tórshavnar kommunu.

§ 1. ØKI.

Økið, sum verður sundurbýtt í eindirnar A, B, C, D, E og F fevnir um tað vídd í Tórshavnar kommunu, sum víst er á hjálagda kortskjali nr. 1.

§ 2. VEGIR.

Lendi skal verða útlagt til hesar nýggju vegir, sum skulu ganga, eins og víst er á kortskjali nr. 1.

1. Ein vegur fram við vestursíðuni á økinum, sum bindur saman Undir Glasheyggi og Oyggjarvegin, verður útlagdur í 20 m breidd, við tværskurði eins og skotið upp á fylgiskjali nr. 2.

2. Ein vegur millum eindirnar B og C frá Hoyvíksvegi til Hoydalsveg verður útlagdur í 12 m breidd við tværskurði eins og skotið upp á fylgiskjali nr. 2.

3. Nakrir húsavegir, sum ganga út í teir vegirnar, sum nevndir eru í 1. og 2. stk., sbr. kortskjal nr. 1, verða útlagdir í 6 m breidd við tværskurði eins og skotið upp á fylgiskjali nr. 2. og somuleiðis nøkur vendipláss.

4. Nakrir gonguvegir verða útlagdir, sum ganga út til vendiplássini, sum nevnd eru í 3. skt., sbr. kortskjal nr. 1.

§ 3. GRUNDSTØDDIR.

1. Meginregla skal vera, at økið verður sundurskitf eins og víst á hjálagda kortskjali nr. 1, og á eindunum A, B, og F má eingin framsíða vera styttri enn 20 m. Á eind C skal lingdin á framsíðuni vera 15 m.

2. Á eindunum A go F má eingin grund vera minni enn 400 m² umframt veglendið. Á eind A er tó loyvt at minka støddina á grundini niður í 300 m², tá húsini verða bygd áføst ella sum raðhús, sbr. § 6, 4. stk.

3. Á eind B má støddin á grundini ikki vera minni enn 500 m² umframt veglendið.

4. Á eind C má støddin á grundini ikki vera minni enn 375 m² umframt veglendið; tó er loyvt at minka støddina niður í 300 m², tá húsini verða bygd áføst ella sum raðhús, sbr. § 6, 4.

§ 4. NÝTSLA AV GRUNDUNUM.

1. Á eindunum A, B, C, og F er bert loyvt at byggja sethús við teimum úthúsum og bilskúrum, sum hartil hoyra. Tó skal vera loyvt at hava slíkt viri, sum vanliga verður útint í sethúsum, tá býráðið heldur tað kann verða gjørt uttan at broyta eyðkenni húsanna sum sethús ella spilla dámin á býlinginumsum bústaðabýlingur.

2. Á eind D er bert loyvt at reisa hús til sølubúðir og tilhoyrandi sethús. Fyri uttan serligt loyvi frá býráðnum má eingin gera hús til framleiðsluvirki, seta slíkt virki á stovn ella at stovna uttanhýsisgoymslur.

3. Eind E verður útløgd sum almenningur við øki til skúla og ítróttarvøll.

§ 5. ÁBYGGING.

1. Ábyggingin er lutfallið millum tað bygda økið við úthúsum og grundøkið.

2. Ábyggingin á eind A má ikki fara upp um 0,30.

3. Ábyggingin á eindunum B og F má ikki fara upp um 0,25.

4. Ábyggingin á eind C má ikki fara upp um 0,32.

5. Ábyggingin á eind D má ikki fara upp um 0,40.

§ 6. STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA.

1. Einki hús á eindunum A, B og F er loyvt at seta nærri marki enn 2,5 m, tó eru undantikin úthús og bilskúrar minni enn 25 $m^2$.

2. Fyri bygging á eind A geldur tað at á grund, har atgonguvegurin gongur norðan og eystan fyri hana, skulu húsini verða sett 2,5 m frá vegmarki; men á grund, har atgonguvegurin gongur sunnan og vestan fyri hana, skulu húsini verða sett 10 m frá vegmarki. Øll húsini skulu langvegin venda í somu ætt sum atgonguvegurin.

3. Á eind C skulu húsini verða sett 13 m frá vegmarki og í minsta lagi 2,5 m frá eysturmarki og grannamarki. Tó er loyvt at byggja í norðurmark, tá ið eingi vindeygu ella dyr eru í skjøldrinum.

4. Eisini verður loyvt á eindunum A og C at byggja húsini áføst ella sum raðhús, um so er, at bygt verður eftir byggiætlan fyri í minsta lagi 6 grundir, sum býráðið hevur góðkent. Øll húsini skulu landvegin venda í somu ætt sum atgonguvegurin.

5. Einki hús á økinum er loyvt at gera við meiri enn einari hædd við innrættaðum lofti og kjallara. Einki stovugólv má liggja meiri enn 50 cm hægri enn hægsta stað í lendinum uttanum; á eindunum A og C skal tó stovugólvið liggja 50 m hægri enn hægsta stað í lendinum uttanum.

6. Yvirsyllin má á økinum ikki vera meiri enn 3 m oman fyri stovugólvið.

7. Reisingin á eind A skal vera millum 30º og 45º, meðan reisingin á eind C skal vera 45º.

   Takini skulu vera saðiltak og mønmin skal venda sama vegin sum atgonguvegurin.

§ 7. ØKI UTTAN UM HÚSINI.
Alt óbygt øki uttan um húsini skal vera hildið í hampiligum standi.
Heldir býráðið, at eitt øki liggur vanrøktað og er til misprýði, kann býráðið krevja, at skil fæst á hesum, og um neyðugt fáa hetta gjørt fyri eigarans rokning.

§ 8. HÚS, SUM ERU BYGD.
Hesar býarskipanarreglur skulu ikki vera til hindurs fyri, at hús, sum lógliga eru bygd frammanundan, verða standandi og nýtt eins og áður. Tó skilar býráðið sær rætt til at taka til ásetingarnar í løgtingslógini um býarskipanir og byggisamtyktir, § 12 um ongartøku, um ikki við góðum fæst semja um avhending av økjum og húsum, sum neyðug eru til at fremja býarskipanina, tá býráðið tekur avgerð um hetta.
At rúmka um hús við at byggja um ella aftrat, byggja upp aftur, tá brent er ella at fara at nýta tey til annað endamál - alt ímóti reglunum í býarskipanini - er ikki loyvt.

§ 9. FYRISKIPANIR UM FYRISITING AV SAMTYKTINI.

1. Kærurætt sambært hesari býarskipanarreglur hevur einans Tórshavnar býráð.

2. Tá bygt verður á einari ogn, skal, áðrenn endalig byggitekning verður gjørd, eitt fyribils uppskot verða sent býráðnum, sum síðani skal siga, um tann ætlaða bygging í meginreglunum samsvarar við býarskipanina og reglurnar í henni.

   Í fyribilsuppskotinum skal vera eitt støðulag í máli 1:500 í minsta lagi sum vísir, hvar øll hús, bygd og ætlað, á ognini standa, og hvussu er við inngongd, umframt stutta lýsing av teim ætlaðu húsum og nýtslau teirra. Tá ið hann, sum ætlaðar at byggja, á henda hátt hevur vissað sær, at tann ætlaða bygging samsvara við meginreglurnar í býarskipanini, verður endalig byggitekning gjørd og send býráðnum við byggiumsókn.
   Hin endaliga byggitekningin skal hava

   1. flatamyndir, skurðir og allar síður í málinum 1:100

   2. Eitt støðulag í málinum 1:500

   Tá býráðið hevur góðkent tað innsendu byggitekning, verður byggiloyvið givið.

1. Býráðið kann í smálutum linka um hesar reglur í býarskipanini.

   Broytingar í reglunum í býarskipanini kunnu bert vera gjørdar, tað býráðið samtykkir og landsstýrið góðkennir, eftir reglunum fyri samtykt og góðkenning av nýggjum býarskipanum, sbr. løgtingslóg § 3, 4. stk.

Soleiðis samtykt av Tórshavnar býráð, tann 3. August 1972.

Uppískoyti til byggisamtykt fyri øki I í Tórshavnar kommunu.
Tann av býráðnum samtykta og av Føroya Landsstýri hin 20. apríl 1963 góðkenda byggisamtykt fyri býarskipanarøki I í Tórshavnar kommunu, verður broytt sambært løgtingslóg um býkarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 § 5 skt. 6 soleiðis:
Partur av teimum í byggisamtyktini § 3, skt. 1, umsøddu á kortskjali nr. 1 vístu útstykkingar á eindunum A og F skulu sum megin regla, sum víst er á hjálagda kortskjali nr. 1A.
Soleiðis samtykt av Tórshavnar býráð
Tórshavn, tann 3. august 1972.
Hetta uppskot til broyting í býarskipanarøki I fyri ein part av Tórshavnar kommunu, samtykt av Tórshavnar býráð, verður góðkent við heimild í gr. 4, 1. parti í løgtingslóg um býarskipan og byggisamtyktir frá 21. mai 1954.
Føroya Landsstýri 19. mars 1974




A: Sethúsabygging
F: Sethúsabygging

## SERSTØK BYGGISAMTYKT:

# Nr 1

Samtykt av Tórshavnar býráð 03.08.1972